

# Sunnleif eigur ólavsøkukantatuna 2009

**Tónaskaldið Sunnleif Rasmussen hevur gjørt nýggja kantatu til Tórshavnar kommunu**

Nú Havnin fyllir 100 er hóskandi við eini serstakari kantatu, sum gongur nýggjar tónlistarligar leiðir og samstundis tekur støði í tí bygda umhvørvi, sum er kring Vaglið og Tinghúsvøllin. Hetta heldur í øllum førum tónaskaldið Sunnleif Rasmussen, sum hevur skrivað nýggja kantatu til Tórshavnar Kommuni.

Kantatan verður øðrvísi á tann hátt, at allur Tinghúsvøllurin verður tikin við í framførsluna.

Á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommuni lýsir Sunleif Rasmussen nýskrivaðu kantatuna soleiðis:

– Ætlanin er at samnantvinna fortíð og nútíð í eina tónleikaframførslu, ella sjov, ið fevnir um kórsang, kingosang, kvøðing, messingblásarar, solosang, elgittar, percussion og elektrontónleik. Kór, solosangarar, elgittar, percussion og dirigentur standa á vøllinum. Kvæðabólkur dansar í býráðsgarðinum og kingosangarar standa og syngja millum Hafnia og Gamla Bókahandil. Tveir trombonleikarar standa á takinum á gamla Apotekinum, tvær trompetir blása úr báðum vindeygunum á Tinghúsloftinum og tvey horn úr vindeygunum á Býráðsloftinum. Samstundis streymar elektroniskur tónleikur úr seks sourroundhátalarum runt alt økið á Vaglinum.



Tekstin til nýggju kantatuna skriva Sólrun Michelsen, Oddfríður M. Rasmussen og Carl Jóhan Jensen.

Ólavsøkukantatan 2009 varir 20 minuttir og eftir hana heldur vanligi kórsangurin fram við sama kóri undir Tinghúsinum.

TÓRSHAVN 1909-2009
Fólkvald kommuna í 100 ár

# Tróndur Patursson einkarsýning á ólavsøku



Undir heitinum 'Lívsins landslag' hevur Tróndur Patursson framsýning á Skipasmiðjuni um ólavsøkuna.

Hetta er fyrsta einkarframsýning hansara í fleiri ár.

Tórshavnar kommuna veit at siga, at 18. juli 2009 og fram til miðjan august sýnir Tróndur Patursson málningar og glaslist í Listahøllini á Skipasmiðjuni. 'Lívsins Landslag' er heitið á framsýningini hjá Tróndi, sum 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu stuðlar.

Tróndur, sum júst er vorðin 65, hevur ikki havt einkarframsýning í Føroyum í mong ár. Tí er 'Lívsins Landslag' ein afturlítandi framsýning, ið gevur innlit í virksemið hjá Tróndi, men eisini ein framsýning við nýggjum verkum.

Tróndur Patursson býr og virkar í heimbygdini Kirkjubø.

Framsýningin 'Lívsins Landslag' er opin til mitt í august.

**Rd.**

## Visti tú?

At ólavsøkan í ár verður sett av Jógvan Arge, formanni í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs.

## Visti tú?

Í sambandi við 100 ára haldið verða allir býráðslimir í Tórshavnar kommunu við í skrúðgonguni ólavsøkuaftan. Øll verða tey í føroyskum búna.

# Havnin swingar

Sunnudagin fyri ólavsøku verða feitir og swingandi havnartónar at hoyra á uttandura konsert í Tórsgøtu. Havnarløg eru sangir úr Havn ella um Havnina.

Magnus Johannessen hevur gjørt útsetingar til kend havnarløg fyri Tórshavnar Stórband. Løgini verða framførd á uttandura palli í Tórsgøtu í Havn sunnudagin 26. juli 2009 klokkan 16. Eisini verður eitt nýtt Havnarlag hjá Magnusi Johannessen frumframført.



Sagt verður, at útsetingarnar av havnarløgum eru í breiðum swing-stíli, við fyrimyndum sum Glenn Miller og Gil Evans.

Havnarløg eru sangir, ið eru úr Havn ella um Havnina. Teirra millum eru 'Eitt sunnukvøld í plantasjuni', 'Havnin er ein lítil bygd' og 'Eitt kvøld á Tinganesi'.

## Ingálvur í Degnshúsi

Á ólavsøku sleppa vit at síggja málningar og tekningar í ættini hjá Ingálvi av Reyni í Degnshúsi.

Umframt at síggja framsýningina við sjáldsamum og privatum verkum eftir framsta listamanni okkara, kunnu fólk eisini síggja søguligu Degnshús hjá Tórshavnar kommunu.

Opið er um alla ólavsøkuna, hvønn dag klokkan 14-19.

# Philippe Carré framsýning á Landsbókasavninum



»Káta hornið«

Í juli mánað sigur listamaðurin Philippe Carré frá, hvussu hann upplivir oyggjar, bygdir og økir í Havn. Eyðkendu og løttu myndirnar hjá Philippe Carré eru blýantstekningar, litlagdar við vatnlitum. Framsýningin er á Landsbókasavninum frá 1.–31. juli. Til 24. juli er opið mánadag til fríggjadag frá kl. 10-15. Ólavsøkudagarnar, 27.–31. er opið frá kl.14-18.



# Lívligt útimøti sum í 70'unum

**Samkomurnar, sum í 70'unum høvdu lívlig útimøti við sangi og tónleiki, skipa fyri konsert og sangløtu í Tórsgøtu sunnudagin fyri ólavsøku**

Endamálið er at endurskapa tey lívligu útimøti, sum vóru á Vaglinum og miðbýnum annars í 1970'unum.

Heitið á konsertini er "Kasta breyð títt út á vatnið..", sum er tikið úr Prædikaranum 11, 1: "Kasta breyð títt út á vatnið, tí tú fært tað aftur um so long tíð gongur!"

Breyðið, sum tey kastaðu á vatnið í 70'unum kemur nú aftur sum ein felags konsert og hugnalig sangløta fyri øll.

Victor Carlsen, sum sjálvur var ein teirra, samskipar tiltakið fyri 100 ára haldið hjá Tórshavnar kommunu.

Tey luttakandi eru úr samkomunum, sum í 70'unum høvdu lívligu útimøtini við sangi og tónleiki. Teirra millum eru Hvítusunnusamkoman, Brøðrasamkoman, Meinigheitshúsið og Frelsunarherurin.



# Føroyar á havsins botni

**Á ólavsøku fer Ingi Sørensen at sýna fram litríkar myndir á havsins botni í Posthúskjallaranum.**

**Ingi Sørensen er kavari og hevur tikið hópin av myndum á havsins botni kring Føroyar. Á ólavsøku sýnir hann 26 litríkar myndir, umframt 150 aðrar myndir av ókendu Føroyum á flatskíggja.**

**Framsýningin verður í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu 27.-31. juli 2009 klokkan 15-19 allar dagarnar.**